ítróttur

Nr. 152 • fríggjadagur • 15. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Vinstra beinið í Champions League

– Eg hugsaði ikki um, hvussu nógv málið var vert. Heldur hugsaði eg um, at eg mátti skjóta eitt afturat, so vit kundu vinna dystin, helt Todi Jónsson eftir málið, sum kann vera hálvthundrað milliónir vert fyri FCK

CHAMPIONS LEAGUE
Jákup Mørk

Sæð burtur frá málinum, so skapa teir ikki so nógvar kjansir, so eg haldi avgjørt ikki, at vit skulu vera bangnir undan seinna dystinum í Parkini, sigur Todi Jónsson

Mynd: Scanpix/Carl Redhead

Tað var sjálvandi ein glaður og væl nøgdur Todi Jónsson, sum vit fingu orðið á hósmorgunin, áðrenn hann saman við liðfeløgunum setti kósina aftur móti danska høvuðsstaðnum.

Sum málskjútti var Todi helst størsta hetjan á danska meistaraliðnum, men meira enn málið, so mundu tað vera mongu milliónirnar, sum nú eru í eygsjón hjá Østergaard og teimum, sum stjólu yvirskriftirnar í donsku miðlunum.

Ætlaði sær meira

Einki er at ivast í – og tað segði Todi eisini við sjónvarpið eftir dystin – at málið hjá honum mundi vera týdningarmesta málið, sum hann hevur skotið fyri FCK.

Men er tað ikki í øllum førum eisini eitt av teimum so absolutt týdningarmestu málunum hjá tær persónligt?

- Tað er tað eisini. Hatta er jú ein av teimum stóru dystunum, sum tú sjáldan sleppur at spæla, so sjálvandi var tað nakað heilt serligt.

Tá tú skjýtur eitt mál sum hatta. Rennur tað so ikki gjøgnum tankarnar, at hatta skotið kanska var vert einar 40-50 milliónir krónur fyri felagið?

- Nei. Tað hugsar tú ikki um á vøllinum. Sjálvandi veitst tú, at tað er ein stórur dystur, men sjálvur hugsaði eg bara um, at nú ráddi bara um at gera eitt mál afturat, so vit eisini kundu vinna dystin.

Og tað var kanska heldur ikki so langt burturi, at hetta kundi eydnast. Eftir at skotska stórfelagið hevði lagt stórt trýst á fyrstu trý korterini, so var FCK munandi betri við eftir steðgin, og tó at teir heilt stóru møguleikarnir ikki komu, so lúrdi vandin alla tíðina.

- Tað er einki at ivast í, at høvdu vit verið eitt lítið sindur kaldari, so kundi tað eydnast okkum. Vit fáa jú eina katastrofala byrjan, men at vit høvdu javnað, vóru teir avgjørt til at tosa við, men okkara trupulleiki var kanska mest, at vit høvdu nýtt so nógva orku í verjupartinum, at vit ikki fingu framrættaða spælið at koyra soleiðis, sum vit vildu hava tað at gera.

Einki at óttast

Málið hjá Toda kom sum kunnugt tíðliga í seinna hálvleiki. Hóast føroyska gleði um hetta, so vóru tað helst mong, sum mundu óttast, tá Todi eitt korter fyri leiklok brádliga steðgaði upp í einum spurti. Armarnir vórðu eisini alt fyri eitt vendir móti skiftisbeinkinum, so ein útskifting kundi fáast í lag.

Tað líktist einum av teimum eftirhondini so væl kendu fipurskaðunum, sum Todi tíverri kennir alt ov væl, men boðini frá leikaranum sjálvum vóru eitt sindur sissandi í so máta.

- Eg kendi á tjúkkunum, at eg var um at fáa krampa. Tá veit eg eisini við mær sjálvum, at ein skaði ikki er so langt burturi, og tí bað eg alt fyri eitt um at verða skiftur út.

Soleiðis er líkt til, at Todi eisini kann verða partur av seinna dystinum móti Glasgow. Ein dystur, sum fer at gera av, hvørt avrikið í Skotlandi var til nakra nyttu yvirhøvur. Uppgerðin fevnir jú um tveir dystir, og tað er bert samlaði vinnarin, sum fær atgongd til Champions League og nógvu milliónirnar.

- Undan dystinum mikukvøldið varð mett, at Glasgow vóru favorittar at koma víðari. Tað eru teir kanska eisini framvegis, men við málinum í Glasgow eru tað í øllum førum vit, sum hava fyrimunin. Kanska ikki ein serliga stóran fyrimun, men og skora teir bara eina ferð í Parkini, so er tað burtur, men vit standa við betru kortunum, sigur Todi, og hann veruliga trýr upp á møguleikan.

- Skal metast eftir dystinum í gjár, so haldi eg ikki, at vit skulu vera so bangnir. Sjálvandi verður uppgávan trupul, men sum eg minnist dystin, so skaptu teir at kalla ongar møguleikar burturúr trýstinum, sum teir høvdu. Álopsleikararnir vóru heldur ikki av tí stóra, bretska slagnum. Tí høvdu teir heldur ikki tað vápnið, sum er at oysa bóltarnar inn í verju okkara, soleiðis sum bretsku liðini annars ofta gera, tá trýst skal leggjast á.

Hevur rindað skuldina

Og skuldi tað eydnast Toda og teimum at spælt seg víðari, so verður Todi fyrsti føroyski leikarin, sum av álvara er við í europeisku meistarakappingin. Har sum mótstoðuliðini kunnu vera Real Madrid, Juventus, Bayern München og Manchester United, bara fyri at nevna nøkur.

Skuldi tað borið soleiðis á. Er tað so ikki nakað av tí størsta, sum tú kann uppnáa sum fótbóltsleikari.

- Akkurát hvat er størst og ikki, er ofta ringt at taka dagar ímillum. Men tað er í øllum førum stórt. Tað eru jú nakrir av heimsins bestu leikarum, sum spæla her, og tað er í øllum førum ikki ofta, at tú hevur møguleikan at spæla móti slíkum, sigur Todi Jónsson at enda. Maðurin, sum fyrr í ár hevði ilt við at tosa seg til eina lønarhækkan í FCK, men sum mikukvøldið rindaði fyrsta avdrátt av lønarhækkanini. Við rentum.

Glasgow Rangers – FCK 1-1 (1-0):

Lovaða landið í eygsjón

FCK hevur nú annað beinið í Champions League bólkaspælinum, har tær nógvu milliónirnar bíða. Todi Jónsson gjørdist stóra hetjan, tá hann javnaði til 1-1

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

Hans Backe, venjari hjá FCK, mælir sínum leikarum til at hava bæði beinini á jørðini, tí ein dystur er eftir enn
Savnsmynd

Tað hevur leingi verið ein dreymur hjá øllum í FCK at koma við í Champions League, har møguleiki er fyri at møta evropeiskum stórfeløgum. Hesin dreymur er nú nærri enn nakrantíð áður.

Við einum 1-1 javnleiki ímóti Rangers á Ibrox leikvøllinum í Glasgow hevur FCK eitt framúr gott grundarlag undan seinna dystinum, sum verður spældur tann 27. august í Parkini í Keypmannahavn.

Skelkandi byrjan

FCK leikararnir vórðu frammanundan ávaraðir um, at Rangers fór at leggja út sum eitt óløgi, og tað var júst tað, sum hendi.

Eftir bert sjey minuttir legði tann skjóti danin Peter Løvenkrands heimaliðið framum. Spaniólin Miguel Arteta sendi eitt frispark innfyri úr vinstru. Málverjin hjá FCK, Balázs Rabóczki úr Ungarn, fór skeivur av bóltinum, og fekk bert skumpað hann út til Løvenkrands, ið stóð við handaru stong og langaði bóltin í netið.

Rangers legði stórt trýst á FCK-málið fyrstu løtuni, og fleiri mundu halda, at danska liðið fór at verða rent um koll av tí bláu bylgjuni. Men luftin fór skjótt úr ballónini hjá Rangers, og FCK kom spakuliga inn aftur í dystin, sum fyrri hálvleikur leið.

Stinn verja

Dysturin gjørdist ongantíð nøkur stór fótbóltsuppliving, um hugt varð við óheftum brillum. Glasgow Rangers spældi ikki væl og hevði sera ilt við at skap veruligar málmøguleikar.

Rangers hevði bert ein annan opnan málmøguleika. Tað var eftir hornaspark, har bóltur varð høvdaður inn í málteigin, har hollendski áleyparin Micheal Mols stendur beint undir málinum. Málverjin Rabóczki var tó kvikur og fekk blokerað á strikuni.

Annars skal sigast, at verjan hjá FCK stóð seg sera væl, um vit síggja burtur frá fyrstu løtuni av dystinum. Serliga Martin Albrechtsen var sera stinnur ímóti Rangers áleyparunum.

Rangers-viðhaldsfólk saknaðu óivað tann málsøkna argentinska áleyparan Claudio Caniggia, sum hóast sín høga aldur hevur víst seg at vera sera vandamikil. Hann er tó ikki longur í felagnum.

Todi á blettinum

FCK kom alt meira við í dystin, og eftir steðgin leikaði tað ógvuliga javnt á báðar vegir. FCK satsaði mest uppá skjótálop, og fleiri ferðir kundi tað blivið vandamikið, men tað vantaði altíð tað seinasta, tá FCK nærkaðist brotsteiginum við bóltinum.

Tað var í veruleikanum ein ógvuliga tilvildarlig støða, sum endaði við, at Todi sendi bóltin í netið.

Hjalte Bo Nørregaard, sum spældi á høgra vongi, royndi seg við einum skoti langt úti frá. Bólturin fór tó í krovið á einum Rangers verjuleikara og datt beint niður til tað vandamikla vinstra beinið hjá Toda.

Hann sendi eftir jørð dygst úti við stongina framvið týska málverjanum Stefan Klos. FCK hevði nú eitt sera virðismikið mál á útivølli, og sjálvsagt var stór frøi á leikarunum, sum nú sóu Real Madrid og Juventus fyri sær.

Ónøgd viðhaldsfólk

Hvørki Rangers ella FCK megnaði at skapa sær nakran málmøguleika eftir hetta. Móti endanum royndi Rangers at leggja trýst á útiliðið, men lítið flog var yvir spælinum hjá skotska stórfelagnum.

Peter Løvenkrands, sum vanliga stendur fyri ágangandi spæli í vinstra borði, slapp sjáldan til baklinjuna, og Ole Tobiasen, sum annars ikki er av skjótastu leikarum, hevði gott tak á honum. Løvenkrands var tann leikarin, sum FCK leikararnir ræddust mest undan dystinum, fjølmiðlar settur spurnaðartekin við, um Tobiasen var rætti maðurin at ansa eftir honum. Tað vísti seg tó, at tað ikki gekk eftir vild hjá Løvenkrands.

Tað var annars stuttligt at síggja bóltsnillingin Sibosisu Zuma, tá hann móti endanum av dystinum helt uppá bóltin, hóast Rangers leikarar bæði rívu og skræddu í hann.

Tá dysturin varð bríkslaður av, gjørdi Rangers-viðhaldsfólkið vart við sína ónøgd, og einki var at ivast í, at tey krevja meira av sínum liði. Í fjør tapti Rangers ímóti einum tjekkiskum liði og slapp tá heldur ikki í Champions League.

Stórt bonus

Um FCK sleppur víðari til bólkaspælið, kunnu spælarar gleða seg til ein stóran kekk frá Flemming Østergaard. 250.000 krónur fáa spælararnir í sín lut, um FCK fyri fyrstu ferð nakrantíð sleppur víðari.

Fyri tveimum árum síðani spældi FCK ímóti Lazio í seinasta kvalifikatiónsdystinum til Champions League. Liðið úr Keypmannahavn vann 2-1 á heimavølli men tapti 4-1 í italska høvuðsstaðnum.

Møguleikin hjá FCK fyri luttøku í Champions League hevur ongantíð verið so góður sum nú, men venjarin Hans Backe hevur mælt til ikki at gleðast ov tíðliga, tí enn er ein dystur eftir at spæla.

– Tað er enn sera opið, hvør fer víðari. Vit eru sera fegnir í skiftingarrúminum í løtuni, men vit royna at hava bæði beinini á jørðini, segði Hans Backe, ið er venjari hjá FCK.

– Tað er ein dystur aftur um tvær vikur, og vit skulu als ikki halda, at sigurin er komin í hús. Rangers skal fram á vøllin í seinna dystinum, og vit eiga at spæla ein góðan dyst frammanfyri okkara egnu áskoð-arum, segði ein smílandi Hans Backe við danskar fjølmiðlar eftir dystin.

From fingið loyvi

Alt er nú komið uppá pláss viðvíkjandi nógv umtalaða skiftinum hjá Karsten From frá HB til NSÍ

LEIKARASKIFTI
Stefan í Skorini

Kappingarnevndin gav mikukvøldið nýggja leikaranum hjá NSÍ, Karsten From, neyðuga spælaraloyvið, og nú er hann endiliga klárur at spæla við runavíkingum.

Fundur var um málið, men nevndin sá ikki nakra forðing fyri at geva honum spælaraloyvið beinanvegin, og hann sleppur tískil undan at bíða í ein mánað, áðrenn hann kann tørna til fyri NSÍ.

Júst hetta skiftið hevur elvt til kjak viðvíkjandi mannagongdini, tá leikarar skifta felag. HB og Karsten From skriva undir ein sáttmála, sum er dagfestur leygardagin 2. august. Sáttmálanevndin hjá FSF fær sáttmálan til góðkenningar fríggjadagin tann 8. august. Hetta upplýsir Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini.

Longu sama dag verður Karsten From loystur frá sáttmálanum við HB og ger nýggjan sáttmála við NSÍ, sum eisini verður sendur til góðkenningar. Evstamark fyri at skifta felag er 10. august hjá bæði avtalu- og áhugaleikarum.

Sum avtaluleikari skal Karsten From ikki bíða í ein mánað, áðrenn hann sleppur at spæla fyri eitt annað felag, sum áhugaleikarar skulu, og tað er hetta, sum partarnir eru slopnir uttanum í hesum førinum.

Formaðurin í kappingarnevndini, Karl Vidtfeldt, heldur, at hetta málið verður tikið upp til eftirmeting, tá feløgini fara at hava fund eftir landskappingina.

Sjálvur vil hann ikki gera nakrar viðmerkingar til, um hann heldur at mannagongdirnar skulu broytast.

Ísland – Føroyar

Ísland og Føroyar spældu fyri stuttum landsdyst í talvi, og her prentað vit úrslitini frá teimum einstøku dystunum.

(Íslendskir telvarar av norður- og eysturlandinum)

Fyrra umfar: 6,5 – 3,5

1. Askell Ø. Karason (2279) - IM John Rødgaard (2234) (hvítt)	0-1
2. Arnar Tórsteinsson (2263) - Carl Eli N. Samuelsen (2187)	0,5-0,5
3. Rúnar Sigurpálsson (2214) - Martin Brekká (2084)	1-0
4. Tór Valtysson (2229) - Finnbjørn Vang (2013)	0-1
5. Pálmi Petursson (2130) - Bernhard Thomsen (1960)	0,5-0,5
6. Halldór Halldórsson (2155) - Herluf Hansen (1914)	1-0
7. Jón Bjørgvinsson (2167) - Jákup á R. Andreasen (1849)	0,5-0,5
8. Stefan Bergsson (1991) - Gunnar Joensen (1827)	1-0
9. Skafti Ingimarsson (1835) - Rúni Dragaberg (1724)	1-0
10. Sigurður Eiriksson (1815) - Jón Mikkelsen (1650)	1-0

Seinna umfar: 4,5 – 5,5

1. Askell Ø. Karason (2279) - IM John Rødgaard (2234) (svart)	0,5-0,5
2. Rúnar Sigurpálsson (2214) - Carl Eli N. Samuelsen (2187)	0-1
3. Tór Valtysson (2229) - Martin Brekká (2084)	0,5-0,5
4. Gylfi Tórhallsson (2218) - Finnbjørn Vang (2013)	0-1
5. Pálmi Petursson (2130) - Bernhard Thomsen (1960)	1-0
6. Halldór Halldórsson (2155) - Herluf Hansen (1914)	1-0
7. Jón Bjørgvinsson (2167) - Jákup á R. Andreasen (1849)	0-1
8. Stefan Bergsson (1991) - Gunnar Joensen (1827)	1-0
9. Skafti Ingimarsson (1835) - Rúni Dragaberg (1724)	0-1
10. Sigurður Eiriksson (1815) – Rani Baldursson (1561)	0,5-0,5

Samanlagt endaði dysturin 11-9 til íslendingar.